# Kommunustjóri, sum torir at ganga nýggjar leiðir




## Vit sóknast eftir einum dugnaligum og framskygdum kommunustjóra at standa á odda fyri Eysturkommunu

### Starvið

Nú grannakommunurnar Leirvík og Gøta hava gjørt av at ganga saman í eina kommunu, er eitt áhugavert, spennandi og fjølbroytt starv sum kommunustjóri leyst at søkja í Eysturkommunu.

Kommunustjórin er ovasti umsitingarleiðari í kommununi og hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni og menningini av Eysturkommunu og teimum stovnum, ið eru og koma í økinum hjá kommununi. Kommunustjórin skal tryggja, at uppgávurnar verða loystar á einum høgum støði, og at bygnaður og mannagongdir eru í samsvari við nútímans krøv. Tú verður sjálv/-ur í stóran mun við til at skapa starvið og menna nýggju samanløgdu umsitingina saman við leiðslutoyminum og starvsfólkunum í kommununi.

### Høvuðsuppgávurnar hjá kommunustjóranum eru m.a. at:

- vera skrivari hjá kommunustýrinum í Eysturkommunu og at vera bindilið millum politisku skipanina og umsitingina
- ráðgeva borgarstjóranum o.ø. og vegleiða í spurningum innan kommunala økið
- fremja skilagott samstarv og samskifti við politikarar, borgaran, vinnulívið, myndugleikar og aðrar áhugabólkar
- gera uppskot um nýggja kommunustýrisskipan, fundarskipan og starvsfólkareglugerð
- byggja upp eitt vælvirkandi og samskipandi leiðslutoymi
- ganga á odda, soleiðis at Eysturkommuna frameftir verður í fremstu røð á øllum økjum

### Førleikakrøv

Vit vænta okkum m.a. at tú:

- hevur viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla ella aðra viðkomandi útbúgving og royndir
- hevur leiðsluroyndir, og at tú við tínum leiðsluhátti skapar trivnað og mennir starvsfólk og kommununa sum heild
- ert tænastusinnað/-ur, fyrikomandi og hevur góð evni og vilja til at samstarva
- ert sjónlig/-ur í kommunalu umsitingini og dugir væl at lýsa sjónarmið fyri øðrum
- ert strukturerað/-ur, hevur skil fyri fíggjarstýring og hevur góðar fyrisitingarligar førleikar
- hevur førleika at menna samstarvið og samskiftið við politikarar, borgaran, vinnulívið, myndugleikar og aðrar áhugabólkar

### Setanar- og lønartreytir

Starvið verður sett frá 1. august 2008 og lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag ella eftir nærri avtalu.

### Umsókn

Umsókn við prógvum, c.v. og øðrum viðkomandi skjølum skulu sendast til:

Eysturkommunu
Postboks 30
512 Norðragøta

ella til t-post: eystur@eystur.fo

Umsóknin skal verða Eysturkommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 9. juni 2008 kl. 12.00.

**Vilt tú hava fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Fríðgerð Heinesen, borgarstjóra, á tlf. 743006 ella til Hans Mourits Foldbo, borgarstjóra, á tlf. 771010. Víst verður eisini til heimasíðurnar hjá verandi kommunum: www.leirvik.fo og www.gota.fo.**

Eysturkommuna hevur 9 kommunustýrislimir, og høvuðsuppgávurnar eru at: virka sambært galdandi lóggávu, gerast betur før fyri at veita borgarunum eina góða tænastu, samskipa umsitingina og raksturin hjá kommununi, verða betur før fyri at taka ímóti nýggjum avbjóðingum í framtíðini, samskipa íløgurnar, skapa betri karmar fyri øktum virksemi í økinum og menna samstarvið við grannakommunurnar.

Í Eysturkommunu eru 1963 borgarar, og starvsfólkatalið í kommununi er 128. Harumframt eru hesir stovnar o.t. knýtt at kommununi: skúlar, tónlistaskúlar, kvøldskúlar, bókasøvn, frítíðarskúlar, svimjihyljar, dagrøktir, barnagarðar, frítíðaransingar, læknamiðstøð, heilsusjúkrasystir, tannlæknar, sløkkilið, eldrasambýlir, dagtilhald og undirhús. Kommunan hevur eisini kommunalt samstarv við aðrar kommunur og myndugleikar.